# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg spurdi tær, um eg skuldi skera tað út í papp, ella um eg skuldi brúka ein fittari máta at siga tingini uppá*

*Jakob Jónsson, landsliðsvenjari*

# Faroe Fitness




*Tað er mest átøkt onkrari fitness-sending, tá hotel-gestirnir á Henipa-hotellinum nú um dagarnar síggja føroyska liðið strekkja út eftir loknar venjingar. Venjingarnar eru vanliga lidnar um middagsleitið, og so skulu vøddarnir sjálvandi mýkjast nakað, og hetta verður hvørja ferð gjørt við svimjihylin á hotellinum. Tina Jacobsen, sum annars hevur langar dagar sum fysioterapeutur á ferðini, stendur á odda fyri hesum, og lítið er at ivast í, at føroysku kvinnurnar njóta møguleikan at fáa nakrar løtur í sólini, heldur enn bert at sita innandura í góða veðrinum.*

-mørk

# Seta vónina til Estland

**Strond og sól skulu lyfta føroyska lagið, meðan okkara kvinnur mugu vóna, at Estland megnar tað, sum Føroyar ikki megnaðu**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Óvæntaða tapið fyri Bretlandi bar við sær, at føroysku venjararnir broyttu skránni hjá liðnum friggjadagin.

Skal metast eftir álopsspælinum hósdagin, so er kanska upplagt, at enn meira verður gjørt við hetta undir venjingunum, men júst nú verður hvíld og mental uppløðin raðfest hægri.

Við finaludystum og nógvum venjingarpassum seinastu dagarnar hava spælararnir helst tørv á, at beinini ikki verða trýst alt ov nógv, og tí verður talan um gongutúr á strondini og stundir til meira leyst prát í dag.

Í kvøld er tað Cypros, sum eigur tørn móti føroysku kvinnunum, og lítil ivi er um, at hetta er ein dystur, sum føroysku kvinnurnar skulu brúka til at vaska sær í.

Verður ætlaði og væntaði sigurin vunnin hesaferð, so er føroyska liðið í hálvfinaluni, men verður talan um annað pláss í bólkinum, verður tað vinnarin av bólki A, sum verður mótstøðan í hesari.

Tí er føroyska ynskið nú, at Estland megnar at basa Stórabretlandi í dag. Verður tað veruleiki, so telja fyrst og fremst innanhýsis uppgerðirnar, og við føroyska stórsigrinum á Estlandi, standa Føroyar í løtuni sera væl í hesum.